Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

Uppskot

# Fótbóltssamband Føroya

**Gundadalur, Postboks 3028, FO-110 Tórshavn**

## Ársfrásøgn

## 2016

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á FSF's ársaðalfundi, tann 18. februar 2017.

______________________________

Petur Even Djurhuus
fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit

Uppskot

| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Upplýsingar um felagið** | |
| Upplýsingar um FSF | 4 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2016** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 11 |

## Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2016 hjá Fótbóltssamband Føroya.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2016 og av úrslitinum av virksemi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2016.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Uppskot

Tórshavn, tann 6. februar 2017

**Daglig leiðsla**

Virgar Hvidbro
aðalskrivari

**Starvsnevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Christian Andreasen<br>forseti | Róin Schrøter<br>varaforseti | Fríðin Ziskason |
| Fróði Danielsen | Kristmund Johannesen | Jákup Martin Joensen |
| Jógvan Páll Joensen | | |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Grannskoðarans ummæli til roknskaparuppskotið**

Uppskot

### Til leiðsluna í Fótbóltssamband Føroya

Vit hava grannskoðað uppskot til ársroknskap hjá Fótbóltssamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2016. Góðkennir leiðslan ársfrásøgnina í verandi líki, geva vit ársroknskapinum hesa grannskoðanarátekning:

"Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Fótbóltssamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2016 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ein ársroknskapur kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Grannskoðarans ummæli til roknskaparuppskotið**

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2016 og av úrslitinum av virksemi í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2016 samsvarandi ársroknskaparlógini."

Uppskot

Hetta ummælið er bert ætlað til innanhýsis nýtslu fyri felagsins .

Tórshavn, tann 6. februar 2017

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

## Upplýsingar um FSF

Uppskot

| | |
|---|---|
| **Felagið** | Fótbóltssamband Føroya<br>Gundadalur<br>Postboks 3028<br>FO-110 Tórshavn |
| | Telefon: 35 19 79<br>Telefaks: 31 90 79<br>Heimasíða: www.football.fo |
| | Heimstaður: Tórshavn<br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember |
| **Starvsnevnd** | Christian Andreasen, Tórshavn, forseti<br>Róin Schrøter, Hvalba, varaforseti<br>Fríðin Ziskason, Klaksvík<br>Fróði Danielsen, Tórshavn<br>Kristmund Johannesen, Skála<br>Jákup Martin Joensen, Tórshavn<br>Jógvan Páll Joensen, Sørvágur |
| **Daglig leiðsla** | Virgar Hvidbro, Tórshavn, aðalskrivari<br>Kirstin Dam Ziska, Tórshavn, varaaðalskrivari |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar**<br>løggilt grannskoðanarvirki<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo |

## Nýttur roknskaparháttur

Uppskot

Ársfrásøgnin fyri Fótbóltssamband Føroya er uppsett í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki B, við neyðugum tillagingum, av tí at talan er um eitt fótbóltssamband. Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

**Umrokning av fremmandum gjaldoyra**

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

Støðisogn, ið er keypt í fremmandum gjaldoyra, verður virðisásett til kursin á handilsdegnum.

## Rakstrarroknskapur

**Inntøkur**

Inntøkan er øll fakturerað inntøka, har vøran ella tænastan er veitt keyparinum innan árslok, umframt atgongumerkjasøla.

Stuðul og aðrar sáttmálatengdar inntøkur verða tiknar við og tíðargreinaðar, samsvarandi sáttmálainnihaldinum.

## Nýttur roknskaparháttur

Uppskot

### Kostnaðir

Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá FSF.

### Fyrisitingarkostnaður

Fyrisitingarkostnaður er kostnaður, ið er farin til at leiða og at fyrisita fótbóltssambandið, íroknað kostnað til fyrisitingarstarvsfólk, leiðslu, skrivstovuhøli, skrivstovukostnað og avskrivingar. Mvg-regulering svarar til tann partin av meirvirðisgjaldinum, sum FSF ikki fær endurrindað. Endurrindanin er bert lutvís.

### Stuðul

Stuðul umfatar kostnað, har FSF stuðlar. Hetta umfatar Menning av Føroyskum Fótbóltsfeløgum, kunning um heimligu kappingarnar, og annan kostnað ið ikki beinleiðis viðvíkur virkseminum hjá FSF.

### Fíggjarpostar

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

## Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Bygningar, rakstrargøgn og innbúgv verða tikin við til útveganarvirði, frádrigið akkumuleraðar avskrivingar og niðurskrivingar.

Avskrivingargrundarlagið er útveganarvirði við væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð frádrignum.

Útveganarvirðið er keypsprísurin, umframt kostnað, ið beinleiðis er knýttur at ognini, til hon er klár at taka í nýtslu.

Tær linjeru avskrivingarnar eru grundaðar á fylgjandi metingar av væntaðu livitíðini og restværdier:

| | Livitíð | Restvirðið |
|---|---|---|
| Bygningar | 25 ár | 0 % |
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 3-5 ár | 0-20 % |

Smáamboð við útveganarvirði undir 20 t.kr. verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verður uppgjørdur sum munurin millum søluprís og roknskaparliga virðið á søludegnum, frádrigið sølukostnað. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrar-roknskapin undir avskrivingum.

Íløgur, ið eru fíggjaðar við stuðli, ella sum eru gjørdar saman við øðrum, verða upptiknar netto og FSF-parturin avskrivaður yvir raksturin. Stuðul verður mótroknaður í bruttoíløgum.

## Nýttur roknskaparháttur

Uppskot

**Goymslur**

Útveganarvirðið á goymslum verður roknað sum keypsvirði, umframt flutningsgjald.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Aðrar avsettar skyldur**

Stuðul til íløgur hjá feløgum umfatar kostnað har FSF hevur játtað at stuðla verkætlanum, ið eru viðvirkandi til menningina av Føroyskum feløgum, og øðrum íløgum hjá feløgum.

**Skuld**

Skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld, og aðra skuld, verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur

Uppskot

| Nota | | 2016 kr. | 2015 kr. |
|---|---|---|---|
| 2 | Inntøkur | 43.946.331 | 42.015.275 |
| 3,4 | Kostnaður | -21.250.737 | -21.127.480 |
| | **Bruttoúrslit** | **22.695.594** | **20.887.795** |
| 4 | Fyrisitingarkostnaður | -13.338.826 | -13.701.258 |
| 5 | Stuðul | -8.655.558 | -2.639.642 |
| | **Rakstrarúrslit** | **701.210** | **4.546.895** |
| | Fíggjarligar inntøkur | 4.579 | 69.757 |
| | Fíggjarligir kostnaðir | -71.334 | -33.875 |
| | **Ársúrslit** | **634.455** | **4.582.777** |

**Uppskot til býti av úrsliti**

| | 2016 | 2015 |
|---|---|---|
| Flutt úrslit | 634.455 | 4.582.777 |
| **Býtt tilsamans** | **634.455** | **4.582.777** |

## Fíggjarstøða

### OGN

| Nota | | 2016 kr. | 2015 kr. |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 8 | Tórsvøllur | 11.025.550 | 20.099.354 |
| 8 | Stadion v.m. | 8.961.717 | 9.361.717 |
| 8 | Rakstrargøgn | 422.518 | 603.643 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 20.409.785 | 30.064.714 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **20.409.785** | **30.064.714** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Fótbóltslutir | 121.543 | 108.016 |
| | Vørugoymslur tilsamans | 121.543 | 108.016 |
| | Skuldarar | 4.402.911 | 4.621.737 |
| | Meirvirðisgjald | 117.517 | 925.565 |
| | Onnur áogn | 128.164 | 151.860 |
| | Áogn tilsamans | 4.648.592 | 5.699.162 |
| | Peningur | 17.477.970 | 9.582.305 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **22.248.105** | **15.389.483** |
| | **OGN TILSAMANS** | **42.657.890** | **45.454.197** |

Uppskot

## Fíggjarstøða

| Nota | SKYLDUR | 2016<br>kr. | 2015<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 9 | Flutt úrslit | 29.993.063 | 29.358.608 |
| | **Eginogn tilsamans** | **29.993.063** | **29.358.608** |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| | Avsetingar til íløgustuðul v.m. | 5.174.766 | 1.000.000 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **5.174.766** | **1.000.000** |
| | **Skuld** | | |
| | Ognarar | 2.207.550 | 2.904.659 |
| | Hattrick grunnur (UEFA) | 0 | 2.526.942 |
| | Forútgoldið, viðv. sjónvarpsrættindum v.m. | 5.192.900 | 9.507.404 |
| | Onnur skuld | 89.611 | 156.584 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 7.490.061 | 15.095.589 |
| | **Skuld tilsamans** | **7.490.061** | **15.095.589** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **42.657.890** | **45.454.197** |

Uppskot

**10 Eventualpostar**

## Notur

Uppskot

### 1. Høvðusvirksemi hjá FSF

Virksemið hjá fótbóltssambandinum er støðugt at menna, stuðla og vekja áhuga fyri fótbóltsspælinum, gera reglur og skipa fyri fótbóltsspælinum í Føroyum, samsvarandi Fair Play, sameina útbúgvingarligu, mentanarligu og menniskjaligu virðini í fótbóltsspælinum og serliga við at fremja ungdóms- og menningarætlanir. Virksemi umfatar m.a.

- At skipa fyri lands- og steypakappingum og øðrum fótbóltstiltøkum í Føroyum.
- At gera reglur og fyriskipanir og tryggja, at hesar verða hildnar.
- At verja áhugamál limanna.
- At virða og forða fyri brotum á viðtøkum, reglugerðum, boðum og avgerðum hjá FIFA, UEFA og FSF eins og "Laws of the Game" og tryggja, at hesi verða vird av limunum.
- At forða øllum, ið kann koma dystum ella kappingum í vanda ella vera fótbóltsspælinum til skaða
- At góðkenna og hava eftirlit við øllum fótbóltsdystum, sum verða spældir í Føroyum.
- At skipa fyri øllum altjóða ítróttarligum samstarvi innan fótbólt.
- At skipa fyri altjóða- og øðrum kappingum.

| | 2016<br>kr. | 2015<br>kr. |
|---|---:|---:|
| **2. Inntøkur** | | |
| Atgongumerkir | 1.430.842 | 1.087.824 |
| Luttøkugjald, kapping og skeið | 1.402.120 | 702.704 |
| Kærugjøld | 106.300 | 136.900 |
| Kappingarskipanin og lýsingar | 1.069.992 | 999.992 |
| Sendirættindi v.m. | 18.574.314 | 18.618.064 |
| ÍSF - Landskassastuðul | 200.000 | 291.760 |
| UEFA v.m. | 13.501.470 | 11.921.603 |
| FIFA | 3.877.327 | 5.066.645 |
| ÍSF - Ítróttarvedding v.m. | 1.120.384 | 850.278 |
| Dómarakonventiónin | 745.000 | 745.000 |
| Marknaðarføring | 1.227.775 | 895.870 |
| Aðrar inntøkur | 690.807 | 698.635 |
| | **43.946.331** | **42.015.275** |

### 3. Kostnaður

| | | |
|---|---:|---:|
| Landslið: | | |
| A-Landsliðið, menn | 8.455.537 | 11.534.139 |
| U-21 Landsliðið, menn | 2.207.358 | 1.214.747 |
| U-19 Landsliðið, menn | 741.676 | 401.349 |
| U-17 Landsliðið, menn | 1.233.893 | 1.207.085 |
| U-15 Landsliðið, menn | 595.240 | 463.561 |
| A-Landsliðið, kvinnur | 809.706 | 605.569 |

Flutt til næstu síðu

## Notur

Uppskot

| | 2016 kr. | 2015 kr. |
|---|---:|---:|
| **3. Kostnaður (framhald)** | | |
| Flutt frá undanfarnu síðu | 14.043.410 | 15.426.450 |
| U-19 Landsliðið, kvinnur | 909.813 | 504.900 |
| U-17 Landsliðið, kvinnur | 679.866 | 733.087 |
| U-15 Landsliðið, kvinnur | 325.809 | 260.101 |
| Nevndir: | | |
| Kappingarnevndin | 569.194 | 499.937 |
| Dómaranevndin | 2.128.964 | 1.980.391 |
| Útbúgvingarnevndin | 2.593.681 | 1.722.614 |
| | **21.250.737** | **21.127.480** |

| | | |
|---|---:|---:|
| **4. Fyrisitingarkostnaður** | | |
| Lønir og samsýningar | 5.491.953 | 5.956.105 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønir | 1.495.627 | 1.368.960 |
| Skrivstovuhald | 445.771 | 833.315 |
| Telefon, internet | 283.069 | 462.022 |
| Ferðir og uppihald | 453.384 | 602.312 |
| Umboðan | 164.592 | 149.128 |
| Fundir | 1.481.074 | 1.311.510 |
| Strategiskt arbeiði | 126.975 | 4.108 |
| Bilar | 93.339 | 89.729 |
| Húsið | 845.200 | 824.712 |
| Sakførari, ráðgeving og grannskoðan | 207.951 | 118.414 |
| Regulering MVG | 635.308 | 863.725 |
| Avskrivingar | 684.483 | 691.637 |
| Annar kostnaður | 829.604 | 424.181 |
| Avskrivað skuldarar / Avset í móti tap | 100.496 | 1.400 |
| | **13.338.826** | **13.701.258** |

| | | |
|---|---:|---:|
| **5. Stuðul** | | |
| Kunning í sambandi við kappingar Føroyum | 213.779 | 202.929 |
| MAFF o.a. stuðul | 8.441.779 | 2.436.713 |
| | **8.655.558** | **2.639.642** |

Uppskot

| | 2016<br>kr. | 2015<br>kr. |
|---|---|---|
| **6. Starvsfólkakostnaður** | | |
| Fyrisitingarlønir og samsýningar | 5.491.953 | 5.956.105 |
| Nevndararbeiði | 529.690 | 517.440 |
| Aðrar samsýningar, venjarar, leikarar o.o. | 7.315.800 | 6.645.561 |
| Bonus | 525.920 | 452.699 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønir | 1.495.627 | 1.368.960 |
| | **15.358.990** | **14.940.765** |

**7. Materiell støðisogn**

| | **Ljósmastrar** | **Tórsvøllur graslíki** | **Svangaskarð** |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2016 | 16.956.192 | 8.180.762 | 11.248.014 |
| Tilgongd | 0 | 0 | 3.197.269 |
| **Útveganarvirði** | **16.956.192** | **8.180.762** | **14.445.283** |
| Stuðul U.E.F.A (Hattrick) | 12.456.192 | 2.480.000 | 9.613.517 |
| Stuðul F.I.F.A | 0 | 2.220.000 | 0 |
| Partur FSF's | 0 | 0 | 3.477.436 |
| Kommunupartur | 4.500.000 | 3.480.762 | 1.354.330 |
| **Niðurskrivingar tils.** | **16.956.192** | **8.180.762** | **14.445.283** |
| **Roknskaparligt virði** | **0** | **0** | **0** |

FSF hevur, saman við Tórshavnar kommunu, gjørt íløgur til kringumstøðurnar á Tórsvølli. Harafturat eru, saman við Nes kommunu, gjørdar íløgur á Svangaskarði. Íløgurnar eru stuðlaðar av UEFA.

## 8. Materiell støðisogn (framhald)

| | Tórsvøllur | Stadion v.m. | Rakstrargøgn |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2016 | 53.858.561 | 17.261.717 | 4.370.684 |
| Tilgongd | 40.313.431 | 0 | 103.358 |
| **Útveganarvirði** | **94.171.992** | **17.261.717** | **4.474.042** |
| Stuðul Fø. Landsstýri | 0 | 2.700.000 | 0 |
| Kommunupartur | -42.607.801 | 0 | 0 |
| Stuðul U.E.F.A. (Hattrick) | -40.538.641 | 0 | 0 |
| **Niðurskrivingar tils.** | **-83.146.442** | **2.700.000** | **0** |
| Avskrivingar 1. januar 2016 | 0 | 5.200.000 | 3.767.041 |
| Avskrivingar í árinum | 0 | 400.000 | 284.483 |
| **Av- og niðurskrivingar** | **0** | **5.600.000** | **4.051.524** |
| **Roknskaparligt virði** | **11.025.550** | **8.961.717** | **422.518** |

Uppskot

## 9. Flutt úrslit

| | | |
|---|---|---|
| Flutt úrslit 1. januar 2016 | 29.358.608 | 24.775.831 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 634.455 | 4.582.777 |
| | **29.993.063** | **29.358.608** |

## 10. Eventualpostar

### Eventualskyldur

TAKS hevur gjørt mvg eftirlit hjá Fótbóltssambandinum í árinum, og hevur í gjøgnumgongdini broytt avgjaldi hjá FSF soleiðis, at TAKS metir seg eiga eina 1,1 mió.kr. tilgóðar fyri tíðarskeiðið 2014 - 2015.

Leiðslan í FSF er grundleggjandi ósamd í metingini hjá TAKS, og hevur kært avgerðina til skatta- og avgjaldskærunevndina.